


*Anna Maria Zachariassen legði dent á at hava klæði til alla familjuna, men hon hevur eisini merkir, ið hava dámuklæði í stórum støddum. - Men tað eru klæðir til dámur, harrar og børn. Sum vit plaga at siga; Tú hevur kroppin, vit hava klæðini, sigur Anna Maria Zachariassen, ið eigur og rekur Klædnahandilin Brá*

# Klæði til hansara og hennara og stór og smá

**Brá er klædnahandil á Norðskála. Handilin hevur 3 ár á baki, men eigarin hevur drúgvar royndir, og metti, at slíkur handil vantaði í økinum, og fór tí undir Klædnahandilin Brá**

Anna Maria Zachariassen fekst í mong ár við handil í Havn, men seldi so, og var so heima í nøkur ár. Men hon misti ikki áhugan fyri handli.

### Tørvur á handli

- Eg helt, at okkum vantaði ein klædnahandil her í økinum, og eg metti tørv at vera á hesum. Tí valdi eg at lata upp handil við klæðum til alla familjuna, so fólk sluppu undan at koyra langa leið, sigur Anna Maria Zachariassen.

- Nógv fólk koma framvið hendanvegin, og tí skuldi møguleiki verið at fingið fólk á gátt, metti Anna Maria Zachariassen.

Og rætt hevði hon, tí hon er í dag væl nøgd við undirtøkuna, ið handilin hevur fingið.

At fleiri aðrir handlar eisini eru í økinum ger eisini, at fólk vitja har á leið, tí útboðið er tað størri og áhugaverdari, tá fleiri fyritøkur hava ymiskt at bjóða í økinum.

### Stór og smá

Anna Maria Zachariassen legði dent á at hava klæði til alla familjuna, men hon hevur eisini merkir, ið hava dámuklæði í stórum støddum.

- Men tað eru klæðir til dámur, harrar og børn. Sum vit plaga at siga; Tú hevur kroppin, vit hava klæðini, sigur Anna Maria Zachariassen.

Klædnahandilin Brá hevði í september 3 ár á baki.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*











